



# Av Mauritius at vitja abba-dóttrina

**Dayarant er fyri fyrstu ferð á vitjan í Føroyum. Sonur hansara er giftur í Leirvík, og Dayarant sær fyri fyrstu ferð fýra ára gomlu abbadóttrina**

VITJAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

2300 ferkilometur stóra oyggin Mauritius liggur í Indiska havinum hálvan tíma við flogfari eystur úr Madagaskar.

Vit føroyingar vita ikki so nógv um hesa oynna, tó at onkrir hava fiskað har um leiðir. Nakað sunnan fyri Mauritius liggur Reunion, har føroyskir sjómenn í eina tíð sótu fongslaðir.

Mauritius varð lutfalsliga seint bygd. Ikki fyrr enn í 1710 setti fólk búgv har, tó at nakrir hálendingar búsettust á oynni í 1598, men teir búðu bert har í 25 ár, og fóru aftur av oynni í 1623.

Annars er fólkaslagið á oynni ógvuliga blandað. Tey koma úr øllum heraðshornum, úr India, Afrika, Europa, ja, úr øllum heiminum.

– Har eru allar mentanir. Tí ber eisini illa til at siga, hvat okkara tjóðarrættur er, greiðir Dayarant frá.

Men hóast fólkið er so blandað, hevur tað altíð liva saman í sátt og semju. Kríggj og ófriður eru ókend fyribrigdi á oynni.

Upprunaliga var oyggin undir fronskum valdi, seinni gjørdist hon bretsk, til teir í 1968 fingu sjálvstýri. Fyrr var jarðarbrúk høvuðsvinnan, serliga sukurrør og tubbakk, men nú er ferðavinnan størsta inntøkukeldan á oynni.

Onkur sera fín hotell eru á oynni, serliga kent er Le Saint Geran, sum er eitt yndisstað hjá eitt nú bretsku kongafamiljuni. Charles prinsur fór í loyndum við unnustuni Camilla Parker-Bowles á ferð til júst hetta hotellið, sum eisini fyrrverandi franski forsetin Jacques Chirac plagdi at vitja. Dýrastu rúmini kosta einar 300.000 krónur um vikuna.

Fiskiveiðan er og hevur altíð verið ein viðfáningur, og kvoturnar verða fyri tað mesta seldar útlendingum at fiska.

## Fitt og blíð

Sonur Dayarant, Waid, fór til Onglands at ganga í skúla, og har hitti hann føroysku Gudny Langgaard. Tey gjørdust góð og Waid flutti heim til Føroya við henni. Tey búgva sum nevnt í Leirvík.

Tað er ikki bara sum at siga tað at ferðast so langan veg, og Dayarant nýtti tveir dagar at koma av Mauritius til Føroya. 29. juni kom hann til landið, og hann fer heim aftur 30. juli. Tað merkir so eisini, at hann fær tjóðarhátíð okkara við.

Hann var eisini so heppin at sleppa at uppliva eitt grindadráp, tað í Gøtu herfyri. Men tað dámdi Dayarant einki serligt. Hinvegin so át hann bæði tvøst og spik, og tað dámdi honum væl.

Annars er ikki nógv at síggja til hval har niðri á Mauritius. Tað er onkur hendinga hvalur sum ferðast framvið har. Men væl er til av Blue Marlin, ið er eitt slag av hornafiski. Har halda tey stórar fiskikappingar, har fólk úr øllum heiminum koma at kappast. Talan er um størstu fiskikappingina av sínum slag í heiminum.

Áðrenn Suezkanalin læt upp, máttu skip sigla runt Cap Horn tá tey skuldu til India, og tá var Mauritius eitt natúrligt stað at leggja at á vegnum. So har var nógv skipaferðsla um tað mundi. Nú siglt verður gjøgnum Suez, koma skipini ikki so langt suður longur.

Dayarant er annars ovfarin av, hvussu nógv føroyingar líkjast mauritianarum í sinn.

– Tað er stórur munur á tykkum og so fransum og bretum. Tit eru smílandi og blíð júst sum fólk eru á Mauritius, sigur Dayarant.

## Føroyingar hittir tú allastaðni

Einaferð hitti Dayarant ein mann, sum ferðaðist runt við missiónsskipinum Dulos. Tá Dayarant spurdi, hvar hesin maðurin kom frá, svaraði hann Danmark.

Tað var stuttligt, helt Dayarant, tí eg havi ein son, sum býr í Leirvík í Føroyum. Tá læt í hinum, at hann eisini var føroyingur og búði í Klaksvík.